DAGSINS MEINING

Íløgukarmurin

Vit hoyra dag og dagliga um íløgukarmin, ið verður sprongdur og tosa fólk nú um at minka kommunala frælsið.

Nú eru kommunalar íløgur sjáldan eftir einari beinari linju. Sum við landsíløgum, so koma tær ofta í stórum klumpum. Spurningurin er, um ein kommunal íløgujáttan ikki burdi verið eitt miðaltal yvir eitt valskeið og ikki eitt árligt tal. Núverandi skipan kann elva til, at kommunur fara at gera alt fyri at fylla sín íløgukarm hvørt tað einasta ár, um tær tørva íløgurnar ella ikki, tí tær ikki kunnu samla upp.

Miðaltalið má helst ikki kunna flytast yvirum valskeið, tí so tekur man dispositiónsfrælsið frá eftirfylgjandi bý- og bygdarráðum. Hettar vildi verið líka ódámligt, sum tað, ið Landstýrið ger við at lækka blokkin munandi bert nakra fáar mánaðar áðrenn valið.

Man má ansa eftir, at ein skipan ikki verður ov stirvin, so at rættningslinjur verða ristar í grót, uttan at spurnartekin nakrantíð verður sett við skipanina.

Lat okkum taka eitt dømi, har ein lítil kommuna skal gera stórar ábøtur á kommunalar ognir, og hesar ábøtur koma at halda í 20 ár. Er tað ikki órímiligt, at ein slík kommuna skal stavnsbindast til at noyðast við lappaloysnir, tí at ábøturnar, um tær skulu gerast ordiligt, koma at spreinga íløgukarmin, óansað hvat ár hesar ábøtur verða gjørdar.

Í allar hesari diskussiónini er sera týdningarmikið at hava fyri eyga, at tað eru politikarar, ið ráða í hesum landinum við ráðgeving frá embætisverkinum. Tað má ongantíð blíva soleiðis, at politikarar standa og yppa øksl, tí ein teknokratisk skipan, ið eyðsæð hevur stórar vansar við sær, verður tikin sum var hon rist í grót og óbroytilig.

Tað skal verða okkara vón, at skipanin við íløgukarminum verður tikin til nývurdering, soleiðis, at ein 4 ára íløgukarmur kann gerast. Hettar hevði givið kommunum fría dispositión yvir tíðarfestingina av íløgunum innan eitt valskeið, bert miðaltalið er tað ásetta.

Landsbúskaparliga eigur siktið at verða so mikið langt, at smávegis variatiónir yvir eitt 4 ára skeið ikki gevur stórvegis trupulleikar.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Í Vestmanna varð kósin sett …

Jóannes Eidesgaard

Eftir ein væleydnaðan og vælvitjaðan landsfund hjá Javnaðarflokkinum í Vestmanna um vikuskiftið góðkendi landsfundurin einmælt valksránna til komandi løgtingsval. Eina valskrá við heitinum "Fólkið fyrst", sum so staðiliga setur lívskorini hjá fólki ovast á dagsskrá.

Sjálvandi er tað altíð áhugavert at frætta frá landsfundum hjá øðrum flokkum, og so man uttan iva eisini hava verið hjá mongum, sum spentir hava bíðað eftir, hvat fór at spyrjast burturúr í Vestmanna. Og ivaleyst hava fleiri ikki roknað við, at Javnaðarflokkurin fór at koma við einari valskrá longu nú?

Men fyri okkum javnaðarfólk hevur tað verið minst líka spennandi at bíða eftir at frættað, hvussu úrslitið av landsfundium fór at verða móttikið. Og sjálvandi serliga spennandi, tá ein nýggj valskrá varð almannakunngjørd.

Og líkt er til, soleiðis sum fyrstu viðmerkingarnar hava verið frá báðum mótpolunum í føroyskum politikki, Tjóðveldisflokkinum og Sambandsflokkinum, at hesir eru í hvussu er tiknir á bóli. Hava ivaleyst trúið, at friður fór at valda eina tíð aftrat, og so kemur hesin framtúrandi Javnaðarflokkurin og órógvar politisku kvirruna í bæði samgongu og andstøðu. Og fullveldismálið hevur fingið kapping.

Vit kundu møguliga bíðað nakað enn, áðrenn vit kunngjørdu okkara valskrá, men nú eru vit bráðir av lyndi í Javnaðarflokkinum, og hin vegin so vildu vit ikki leggjast á boðini. Til tess vóru tey alt ov góð.

Fyrstu viðmerkingarnar benda so á, at Javnaðarflokkurin við valskránni "Fólkið fyrst" opinbart hevur rakt seymin so lúkst á høvdið.

Tjóðveldisflokkurin er ikki bara ørkymlaður, men hálvavegna "groggy". Og sjálvt tá Høgni Hoydal fær framíhjárætt til einsamallur og uttan mótspæl at útleggja tekstin frá landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum í Útvarpinum, so verður tað bert til gor og gall. Men hvat skal maðurin gera? Her kemur størsti andstøðuflokkur og purrar vánaliga samvitskuna út hjá fyrst og fremst Tjóðveldisflokkinum. Og hvat billa hasi javnaðarfólkini sær inn at tosa um annað enn fullveldið.

Tá ein einki sakligt eigur at koma við, so verður í staðin farið undir at grýta Javnaðarflokkin undir við alskyns lygnum og hálvgum ókvæmsorðum. Gummicheckar, ábyrgdaloysi, 80´ara politikkur o.l. tað var tað, Høgni Hoydal orkaði á hesum sinni.

Jú, forrestin hann segði eitt aftrat, og tað var, at Javnaðarflokkurin borðreiðir við sama politikki, sum koyrdi landið á heysin. So fingu vit tað at vita frá Tjóðveldisflokkinum. Tað vóru batar á almanna-, heilsu- og skúlaøkinum, sum sambært Høgna Hoydal koyrdi landið á heysin. Áhugavert sjónarmið, sum tó ikki fær Javnaðarflokkin at broyta politikk.

Sambandsflokkurin er meira hóvligur og sinnligur í síni viðmerking. Hann heldur tó fast við, at tað sum ikki einaferð bert eru teir, sum eru teir skilagóðu og dugnaligu. Men at bróta upp úr nýggjum hevur nú ongantíð verið vørumerkið hjá Sambandsflokkinum, tó hann kanska fegin onkuntíð kundi hugsað sær at verið fyrstur frammi við onkrari nýhugsan.

Men eg kann vissa báðar flokkar um, at fyrstu glepsini frá tykkum vóru kærkomin. Tað var hugaligt at lesa viðmerkingarnar Tykkara atfinningar og tykkara álop eru tónleikur í oyrum javnaðarmanna, tí tit sannføra okkum um, at vit eru á rættari kós.

Góður javnaðarpolitikkur eigur ongantíð at smakka hvørki tjóðveldismonnum ella sambandsmonnum og sjálvandi enn minni Fólkaflokkinum. Og fyribils eru vit nøgdir við móttøkuna. Takk fyri tit báðir Høgni og Eilif.

Kósin úr Vestmanna er eftir øllum at døma meira enn á einari góðari leið.

Nýggj Telebúð í Saltangará

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 21. september kl. 14 letur Føroya Tele upp nýggja Telebúð í Saltangará.

Nýggja Telebúðin verður við einari snøggari og nýmótans innrætting flaggskipið hjá Føroya Tele og ein fyrimynd fyri, hvussu hinar Telebúðirnar kring landið fara at verða innrættaðar í framtíðini.

Í hesum sambandi verður móttøka í nýggju Telebúðini fríggjadagin millum kl. 14 og 18, har øll eru vælkomin.

Ballónir og annað verður til børnini og leygardagin skrívar Regin Vágadal, sum FøroyaTele er høvuðsstuðul hjá, autografar.

Harumframt bjóðar FøroyaTele góð tilboð uppá GSM- og tráðleysar telefonir.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ítrótur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

VIÐMERKINGAR

Kommunusamanlegging við Skálafjørðin

Bill Justinussen

Nú hoyrdist so aftur nýtt um ætlaðu samanleggingina millum Skála og Runavíkar Kommunu. Síðani málið fyrstu ferð varð almannakunnugt mitt í summar hevur verið gravartøgn, hóast ætlanin er at fáa borgararnar í kommununum báðum at atkvøða um spurningin.

Tíð til alment kjak

Sum áður greitt frá haldi eg framvegis, at styrkin í fólkaræðinum er tíð til alment kjak um allar viðkomandi spurningar og opið samskifti millum tey fólkavaldu og borgaran. Verður hetta ikki virt, er vandi fyri, at fleiri viðurskifti, sum politikkararnir ikki gjøgnumskoða, ikki koma fram í ljósmála, fyrrenn alt er avgjørt. Tað undrar meg stórliga, at bert tann eini kommunustýrislimurin (so vítt, sum eg havi verið varugur við) hevur tikið málið upp í bløðunum. Er so lítið at siga um hetta málið, at fá hava eina meining, so er ivasamt, um nøkur nytta er í samanleggingini. Og enn meiri undrist eg á, at ikki eitt orð varð grett um hetta týðandi mál, tá fólk fyri knøppum ári síðani bjóðaðu seg fram sum valevni til kommunuvalið.

Grundgevingarnar

Grundgevingarnar fyri samanleggingini kenna vit framvegis ikki, hóast okkurt hevur verið at hoyrt um samanlegging av funktiónum og harvið bíligari rakstur. Samarbeiði er eitt takksamt orð, og undir tí heitinum er so mangt farið av bakkastokki. Men ikki eru fylgjurnar altíð so ljósareyðar. Sum dømi um samarbeiði millum bygdir í einari kommunu kunnu vit taka skúlaverkið í Runavíkar kommunu. Tað er leikin í okkara kommunu, og er orsøkin uttan iva lokalpolitikkur innanfyri kommunumark. Avleiðingarnar av hesi skipan eru nógvar. Hvønn morgun fara børn úr Lamba, av Glyvrum, úr Saltangará og úr Runavík við bussi til Søldarfjarðar og Rituvíkar, samstundis sum børn úr Rituvík og Søldarfirði fara við bussi til Glyvrar og Runavíkar. Sostatt sleppa rituvíkingar og søldfirðingar at hava síni smáu í nærumhvørvinum tey fyrstu skúlaárini, meðan vit í miðøkinum ikki hava tann møguleikan. Kostnaðurin av at hava fýra skúlar heldur enn ein er í onkrum føroum fýra ferðir hægri. Vit hava t.d. 4 fimleikahallir heldur enn eina, sum hvør í sínum lagi krevur viðlíkahald, útgerð og umsiting. Í hesum føri dupultfunktiónir, sum í kommunusamanleggingarhøpi áttu at horvið. Tá so Skála skúli er komin afturat, hava vit 5 skúlar og 5 hallir, kanska 6. Okkara kommuna er í ávísan mun fongd við hendan lokalpolitikkin, tað eru tey 6 valstøðini eitt gott dømi um. Hetta vísir, at hóast vit hoyra til somu kommunu, er niðurlegging av dupultfunktiónum ikki so sjálvsøgd.

Sum eitt kuriosum kann tað hugsast, at hesin lokalpolitikkurin við m.a. dýrum skúlabygnaði er ein av orsøkunum til, at vit sum ein tann størsta kommunan í landinum ikki hava ráð til eina svimjihøll, sum ikki færri enn 6 aðrar kommunur í Eysturoynni hava. (So hví ikki heldur leggja saman við eini kommunu, sum eigur ein svimjihyl.)

Samarbeiði fyrst, síðani samanlegging

Tað ber væl til at samstarva um øll hugsandi mál, uttan at leggja saman. Tí mæli eg framvegis til, at eitt miðvíst samarbeiði fyrst verður skipað fyri síðani at taka støðu til samanlegging. Tá hava vit royndir og betri grundarlag at taka støðu á. Hetta samarbeiði eigur eisini at roynast við grannakommunurnar við tí sama fyri eyga, tí tann besta loysnin var, at allar kommununrnar við Skálafjørðin vóru við í fyrireikingunum.

Høgni Hoydal er óseriøsur

Kristian Magnussen
løgtingsmaður

Ætlanin hjá Høgna Hoydal og hansara strategum er greið: Onnur mál enn fullveldismálið skulu ikki á dagskrá til komandi løgtingsval. Hann er, í bløðunum fyrradagin tann fyrsti við viðmerkingum til valuppleggið hjá Javnaðarflokkinum.

Sum so segði hann onki nýtt, men enn einaferð fingu vit somu slitnu endurtøkurnar, um at hinir aftur vilja rena landið á heysin. Hesaferð snýr hansara eyðkenda, óseriøsa rangsnúgving seg um tað,ið Javnaðarflokkurin hevur sett sær fyri í komandi valskeiðið.

Greinin hjá Høgna Hoydal er ikki tann fyrsta, har hann tileinkisger tørvin á ábótum og nýskipanum innan okkara vælferðarskipanir. Hevur nakar sæð ella hoyrt hann skjóta upp ein einasta ítøkiligan bata innan nakað øki, har borgarin hevur brúk fyri samfelagsins solidariteti?

Einastu rakstrarstøð Høgni Hoydal hevur raðfest á fíggjarlógunum síðan hann kom upp í politikk, eru tey, ið eru beinleiðis liður í kvettroyndini hesaferð. Fyri at kamuflera kynismuna endurtekur hann við jøvnum millumbilum, at vit skulu hava veruligt samhaldsfesti, og at virðini skulu býtast rættvísari.

Tjóðveldisflokkurin hevur hetta valskeiðið reypað av, at teir hava sett part av ríkisveitingini inn á bók, samstundis sum okkara skúla-, sjúkrahús- og almannaverk støðugt forfalla. Tað er løgið reyp av Tjóðveldisformanninum, tá hann førir fram, hvussu teir t.d. hava raðfest almannamál, alt meðan t.d. føroyingar við serligum tørvi framhaldandi eru noyddir at flyta til Danmarkar. Samstundis verður ríkisveitingin, ið skuldi gera tað møguligt hjá teimum at verða verandi í Føroyum, sett inn á bók.

Tað er ikki álitisvekjandi, at politikarar, ið siga seg brenna so nógv fyri nationalum fullveldi, ikki hava vet av forstáilsi fyri fullveldinum og integritetinum hjá tí einstaka. Hvussu sær fullveldi út hjá einum óhjálpnum, ið er seingjaliggjandi, einsamallur og eyðmíktur í sínum egna skadni? Nær ætlar Tjóðveldisflokkurin at syrgja fyri hansara fullveldi?

Høgni Hoydal sigur í greinini, at Javnaðarflokkurin vil seta fólkið fyrst, um vit fáa danskar pengar, og um Nýrup vil játta meiri pengar. Hetta vísir bert, hvussu óseriøsur hann er. Javnaðarflokkurin hevur ikki avgjørt at blokkurin skal hækkast.

Tað sum rætt er - og sum eisini er endurgivið í bløðunum - er at eg havi fört tey sjónarmið fram á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum, at tað óiva verður neyðugt at biða um samráðingar við danir, um at fáa blokkin upp aftur á eitt rímuligt støði, soleiðis at vit hava fíggjarligu orkuna til at seta lívskorini hjá fólkinum aftur á dagskrá.

Í Javnaðarflokkinum er tað hóast alt so, at vit kunnu kjakast og hava meir ella minni avgjørd sjónarmið um ymisk viðurskifti. Men slíkan hugburð skilir Høgni Hoydal óiva ikki.

Vit kendu okkum kosin…

Hanna Lisberg
Tórshavn 20.09.01

Skaldið yrkir:
Vit kendu okkum kosnar
til vøkur verk og stór,
vit kendu okkar akur fór
at vaksa
og fyri okkum birtist ein
fløta við og stór
har væl var sáað, væl
varð velt og saksað

Eg spyrji: hvar er virðingin fyri teim gomlu? Borgarstjórin í Havn hevur sýnt so stóra vanvirðing fyri gamla fólkinum – og fyri so vítt umrøddu umsøkjarum,ið talað verður um í Sosialinum 20.09.01 við at tveita teirra umsókn til onnur, enn tey, hon var ætlað.

Ein umsókn av hesum slag hoyrir heima í sosialu nevnd, men borgarstjórin tekur sær av málinum, soleiðis at *hann* skapar óneyðuga øsing.

Í fyrstu syftu fara tíðindi um býin, at nú missir gamla fólkið kjallaran, tí umsøkjari(ar) skulu hava hetta til: »matstovu við so fínum vínkorti, sum ikki hevur sæð sín líka her um vegir o.s.fr.

Eg havi sæð umsóknina, tí hon er send okkum úr býráðnum. Hetta er ósømiligt móti umsøkjarunum. Men tað er eisini ósømiligt av teimum at ringja til okkara og spyrja um úrslit av okkara nevndarfundum – og at koma í húsið, sum teir longu høvdu fingið hesa umbøn.

Men borgarstjórin *átti* at beint umsóknina, har hon hoyrdi heima, enn at ringja í tíð og úrtíð (t.d. kl. 21.00) um kvøldið til mín – eftir at vit høvdu átalað hansara framferð, og víst til, at um hann hevði nakað at tosa um viðvíkjandi ognini, skuldi hann venda sær til nevndina.

Býráðslimir, eg talaði við, søgdu, at teir kendu einki til hesa umsókn; eg spurdi borgarstjóran, hvat Heðin Mortensen, sum hevði gjørt eitt stórt arbeiði, segði. – Nei, segði borgarstjóri – tað visti Heðin einki um.

Leivur Hansen flenti, tá eg spurdi hann, visti einki um tað, men legði afturat – 4 ár ov seint. – Torfinn visti einki – Elin Lindenskov visti einki (er í sosialu nevnd). – Tilhaldið fekk ORDRA til at svara, áðrenn 1. sept. 01. (Enn veit eg ikki, hvat svarast skuldi uppá. Vit viðgera ikki umsóknir!!)

Tann 18.09.01 hevur sosiala nevnd fund, nú er málið komið á skrá – 2 mánaðir eftir at umsóknin er. Sjálvandi er saklig viðgerð har. Málið varð avvíst, tí samtykt fyriliggur um Tilhaldið. Hetta hava vit frá fyrsta degi greitt borgarstjóranum frá.

Eg vil ikki í hesum umfari koma nærri inn á málið. MEN eg átali harðliga ta ósømiligu framferð, borgarstjórin hevur víst. Tað er undir lágmark og óhugsandi, at nakar annar borgarstjóri vildi gjørt.

Persónliga havi eg nógv at takka serliga: Lisbeth Petersen, Poul Michelsen og Leivur Hansen. Eg sat í fleiri nevndum í yvir 20 ár og veit hvat eg skrivi um. Slíka atferð høvdu tey ætast at frætt um.

Í Tilhaldinum

Savnsmynd